# Ikki mist vónina um tunnil

**Fyri fólkið í Svínoy er ein tunnil Yvir til Havnar at avgerandi týdningi fyri at bygdini skal verða lív lagað í framtíðini. Hóast hetta brennandi ynskið, so gongur heldur striltnari at fáa landsins myndugleikar at skilja støðuna og játta neyðuga peningin til ætlanina**



*Svínoyingar hava enn ikki mist vónina um at fáa ein tunnil í oynni. Men berast má skjótt at, tí annars kann gerast øskukalt í oynni áðrenn*

SAMFERÐSLA
*Snorri Brend*

**Svínoy:** Tey stríðast manniliga fyri síni søk – bygdarráðið og fólkið í Svínoy.

Bygdarráðið í Svínoy hevur nevniliga í fleiri ár sent løgtingi umsóknir um at betra um samferðsluviðurskiftini á oynni, m.a. við einum tunli á staðið Yvir til Havnar, sum tey nevna tað.

Um so var, at hesin tunnilin kom, so kundi bygdarfólkið havt samband hvønn einasta dag til Hvannasunds ella Norðtoftir uppá umleið 15 min.

- Gjørdist hetta til veruleika høvdu samferðsluviðurskiftini hjá oynni verið loyst, sigur bygdarráðið.

Hóast henda veruleika, so er líkt til at landsins myndugleikar ikki vilja lurta eftir umsóknunum frá svínoyingum.

### Øskukalt

Í seinasta brævinum frá bygdarráðnum verur sagt, at fáa tey ikki viðurskiftini við samferðsluni uppá pláss í næstu framtíð, verður bygdini ikki lív lagað.

- Heitt verður staðiliga á landstýrið um at taka hetta álvarsmál upp nú. Hetta má ikki setast á eina langtíðarfíggjarætlan, tí tá er øskukalt í Svínoy, sigur bygdaráðið í eini umsókn, sum í fjør varð send innlendismálaráðnum.

Men herfyri bórust kortini tey tíðindi, at Landsverk hevur steðgað øllum kanningum av hesum prosjektinum, tí játtanin vantaði.

Hetta vildi kommunan ikki lata sær lynda, og hevur tí enn einaferð heitt á løgtingið um at játta pening til ætlanina.

- Vit heita á tykkum um at játta neyðuga peningin, so stígur ikki kemur í forkanningarnar, sum eru gjørdar í summar, sigur bygdarráðið í nýggja brævinum, sum er dagfest 22. juli í ár. Bíðað verður eisini eftir eini kostnaðarmeting av prosjektinum.

Í sama viðfangi søkir bygdarráðið eisini um at peningur verður settur av til sjálva verkætlanina komandi fíggjarár.

# Í lagi at privatir reka tunnilin

**Hóast fyrireikingin til Skálafjarðartunnilin er komin væl áleiðis, so hevur ikki verið nógv at hoyrt um leiklutin hjá landsstýrinum. Hetta vildi tingmaðurin, Dánjal Petur Hansen fegin hava at vita, og tí var stutt orðaskifti um hesi viðurskifti á tingi hósdagin. Líkt er ikki til, at nakar í tinginum hevur nakað ímóti hesi privatu ætlanini**

TUNNIL
*Snorri Brend*

**Skálafjørður:** - Er nakað til hindurs fyri at eitt privat partafelag kann eiga og reka ein undirsjóartunnil millum Skálafjørðin og Suðurstreymoy?

Henda áhugaverda spurning reisti tingmaðurin Dánjal Petur Hansen á tingi hósdagin, tá munnligir fyrispurningar vóru á skránni.

Tingmaðurin vildi eisini hava at vita, um vinnumálaráðharrin, Bjarni Djurholm helt, at henda verkætlanin skuldi skipast á sama hátt sum hinir undirsjóartunlarnir í Føroyum.

Og í triðja lagi setti hann fram spurningin, um landsstýrið hevur viðgjørt henda spurningin, sum hevur so stóran áhuga millum fólk í Eysturoynni og serliga tann bólkin, sum í longri tíð hevur fyrireika hesa verkætlanina.

Hesin bólkurin er sinnaður at fara undir gerð av tí triðja undirsjóartunlinum í Føroyum. Sum skilst verður nærri at frætta um hetta málið um ikki so langa tíð, tá ætlanin verður løgd meiri nágreiniliga fram.

Tá uppskotið á sinni varð lagt fram kundu teir upplýsa, at um alt gekk eftir tíðarætlanini, so var ikki óhugsandi at koyrandi varð av Skálafjørðinum til Havnar í 2011.

### Samfelagsligur týdningur

Dánjal Petur Hansen er komin á ting sum varamaður fyri Kára Højgaard. Og á fundinum hósdagin ynskti hann at fáa Bjarna Djurholm at úttala seg um hesa ætlanina, sum fer at verða samferðsluni at stórum gagni.

Hann vísti á, at hesin fyrireikingarbólkurin er komin væl ávegis við sínum forarbeiði. Teir hava nú fingið til vega undirbygdar kostnaðarmetingar. Dømi um kostnað fyri at koyra ígjøgnum hendan tunnil og ætlanir um linjuføring hava somuleiðis verið alment frammi.

- Her er uttan iva talan verður um størstu og kostnaðarmiklastu verkætlanina í Føroyum nakrantíð.

- Men tað tykist kortini lítil ivi vera um, at talan er um eina verkætlan har nýtslugjaldið væl klárar at rinda allar útreiðslur, sum eru knýttar bæði at íløgum og rakstri, segði Dánjal Petur Hansen, sum sjálvur er heitur talsmaður fyri hesum tunli.

Umframt at verða talan um eina sera arbeiðsskapandi verkætlan, so er her talan um verkætlan sum samfelagsliga kemur at hava stóran búskaparligan týdning, eins og sera stóran týdning fyri trygdina og trivnaðin hjá borgarunum.

Hinvegin so undraðist Dánjal Petur á, at so lítið hevur verið at hoyrt um leiklutin hjá landsstýrinum í samband við hesa verkætlan.

- Tað er undrunarvert, tí at tað jú er uppgávan hjá tí almenna at eiga og reka allar landsvegir okkara. Tað eru eisini 100% almenn partafeløg sum eiga og reka Vágatunnilin og Norðoyatunnilin, segði tingmaðurin.

Hann vísti á enda á, at áhugamálini og endamálini aftan fyri privatar og almennar íløgur í flestu førum als ikki eru tey somu. Og tí ynskti hann nú at fáa landsstýrismannin at svara fyrispurningum sínum.

### Brotið upp úr nýggjum

Á tingfundinum hósdagin kom fram, at hetta í veruleikanum er eitt rættiliga prinsipielt mál.

Higartil hevur landið fullkomuliga átikið sær allar uppgávur av slíkum slagi. Í hesum føri hevur hesin áhugabólkurin fyrireikað eitt uppskot út í æsir, og hevur tí í ein ávísum mun brotið upp úr nýggjum.

Landsstýrismaðurin Bjarni Djurholm vísti í svari sínum m.a. á, at landsstýrið var væl kunnað um ætlanina hjá hesum privata felagnum. Út frá orðaskiftinum kundi ein staðfesta, at eingin hevði nakað størvegis ímóti at eitt slíkt felag vildi átaka sær hesa stóru uppgávuna, sum jú ikki kemur at tyngja landskassan.

Spurningurin um undirsjóartunnilin til Sandoynna kom ikki óvæntað eisini inn í orðaskiftið. Her vísti Bjarni Djurholm kortini á, at hesar báðar ætlanirnar hava einki við hvørja aðra at gera sum so.

Í høvuðsheitum kunnu báðar ætlanirnar verða gjørdar samstundis, men spurningurin er altíð um raðfesting, búskaparlig atlit og arbeiðstól.

## Talv, country og hugni

**Vestmanna:** Í talvfelagnum í Vestmanna hugsa tey ikki bert um talv. Men eisini um tónleik.

Tí hevur felagið ætlanir um at skipa fyri einum stórum country-festivali í bygdini í døgunum 16. til 18. september.

Til hetta stóra tiltakið krevst sjálvandi peningur og stuðul. Felagið hevur tí í hesum sambandi vent sær til bygdaráðið við eini umsókn um stuðul til tiltakið, m.a. til leigu av ítróttarhøllini.

Í eini umsókn, sum bygdaráðið skal taka støðu til á fundi týsdagin, verður somuleiðis biðið um loyvi at brúka økið innanfyri brandstøðina til parkering av campingvognum.

Fíggjarnevndin í bygdaráðnum hevur havt málið til viðgerð, og nú skal bygdaráðið so taka avgerð í hesum málinum.

**sb.**

## Lág miðalferð

**Borðoy:** Miðalferðin hjá teim bilførarum, ið koyrdu eftir tunnilvegnum á Borðoynni í fjør var í lagi: Hon var beint omanfyri 60 km. um tíman.

Eitt yvirlit frá Landsverki vísir hinvegin, at miðalferðin í Kollfjarðartunlinum og í Leirvíkartunlinum var omanfyri ta loyvdu.

Í Kollfjarðartunlinum var miðalferðin um 85 km/t, meðan ein í Leirvíkartunlinum máldi eina ferð, sum lá eitt lítið vet hægri.

**sb.**

## Gullkorn við telduposti

Øll, ið hava atgongd til eina teldupostadressu, hava nú hvønn gerandisdag møguleika at fáa smá gullkorn úr Bíbliuni fram á telduskíggjan. Talan er um eina ókeypis og óbindandi tænastu, ið Bláí Krossur Føroya stendur fyri.

Bíblian verður nógv lisin av føroyingum, men heimsins mest lisna bók er kortini drúgvur lesnaður, tí hon telur ikki færri enn 1236 síður. Ymiskt er, hvussu fólk lesa hana. Nøkur lesa ein kapitul hvønn dag, onnur lesa úr onkrari bíbliulesiætlan, meðan onnur taka sær eitt ella fleiri pappír mannakorn, ið kunnu keypast í handlum.

Nýggja tænastan hjá Bláa Krossi er í grundini bert ein dagføring av gomlu mannakornunum samsvarandi við tíðarrákið í dag, ið skiftir pappír út við teldupostar.

Bláí Krossur hevur tó áður roynt hesa tænastuna, og fekk tænastan tá sera góða undirtøku.

- Vit høvdu ikki færri enn 250 haldarar og fingu nógvar positivar afturmeldingar frá fólki, ið vóru sera glað fyri eitt gott orð á vegnum í einum mangan strongdum gerandisdegi, sigur aðalskrivarin, Jaspur Langgaard.

Henda tænastan steðgaði vegna tekniskar trupulleikar fyri uml. tveimum árum síðani, men nú er so klárt at byrja aftur. Øll eru vælkomin at tekna seg sum haldarar, tí tænastan er bæði ókeypis og óbindandi. Um onkur ynskir at royna hesa tænastu, kann viðkomandi sjálvur fara inn á heimasíðuna www.blakross.fo og melda seg sum haldara av mannakornum.

**sb.**